# Havnarmenn minka um munin

**Eitt uppsett havnarlið vann á oddaliðnum úr Klaksvík. Spenningur er íbirtur nú kappingin er komin í helvt**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

– Nú skulu klaksvíkingar niður við nakkanum! Soleiðis orðaði ein telvari seg á havnarliðnum innan dystin í sunnudagin í Klaksvík. Havnarmenn ætlaðu sær stórsigur. Teir fingu eisini ein sigur heim við aftur, men talan varð um ein javnan dyst, ið júst koppaði yvir til útiliðið.

Manningin á klaksvíksliðnum hevði faktiskt ikki tapt nakað talv fyrstu fýra umførini. Í sjálvum sær eitt bragd, sum eisini hevði við sær, at verandi føroyameistararnir trygt lógu fremstir, hálvtriðja stig ovari enn havnarmenn. Men eftir tepra sigurin hevur havnarliðið minkað um munin, soleiðis at hálvtannað stig nú eru upp til norðoyingarnir.

## Toppskorarnir

Á fyrsta borði vann Martin Poulsen við hvíta fólkinum eitt drúgvt talv móti Eyðuni Nolsøe. Sum skilst úr Klaksvík, vann Olaf Berg rættiliga sannførandi á Ólavi Simonsen. Olaf hevur nú 4,5 stig av fimm talvum og er toppskorari á havnarliðnum.

Somu skoru hevur Finnbjørn Vang eftir sín frálíka sigur á Boga Ziska. Finnbjørn er á veg væl yvirum 2100-markið á ratinglistanum. Spennandi verður at síggja, um hann megnar at halda stimanum í seinnu helvt, sum fer av bakkastokki 09. januar. Tá koma vestmenningar á vitjan í Klaksvík. Rani Nolsøe og Herluf Hansen leiktu ein friðarligan javnleik á fjórða borði.

## Brekká & Co

Matsjvinnarin í dystinum millum Vestmanna og Hvalvík, varð Martin Brekká. Vetaranurin, sum mann eftirhondini kann kalla hann, vann á triðja borði ruddiliga á Samson Højgaard, eftir at hesin seinni leikti skeivt tíðliga í talvinum.

Hini trý talvini endaðu jøvn. Á fyrsta borði hittust havnarmennirnir, Carl Eli N. Samuelsen og Rógvi W. Rasmussen, sum ávíkavist telva fyri Vestmanna og Hvalvík. Hetta varð fyrsta talvið hjá Carl Eli fyri nýggja felagið sítt. Rógvi fekk fyrimun í miðspælinum, men fann ikki røttu planina. Í endatalvinum varð tað Carl Eli, ið royndi at vinna, men Rógvi fann djúpt inni í endatalvinum eina verjuplan, sum bjargaði honum javnleikin.

Finnbjørn Zachariassen hevði helst fyrimun at kalla alt talvið móti Jákup á R. Andreasen. Og hóast materiellan yvirvág, eydnaðist tað ikki Finnbjørn at bróta verjugarðin hjá Jákup, sum vardi seg væl, niður. Eftir nakrar avbýtingar, samdust John Jacobsen og Gunnar Joensen um javnleik á fjórða borði.

Heldur ikki fimta umfar gav toftamonnum nakað at fegnast um. Kollfirðingar vunnu greiðan 3,5-0,5 sigur á botnliðnum. Við sigrinum yvirhálaðu kollfirðingar vestmenningar á fjórða plássinum. Frá at hava verið á deildum øðrum plássi tá trý umfør vóru leikt, eru vestmenningar nú á fimta plássi. Tó eru teir ikki í niðurflytingarvanda, tí heili 6,5 stig eru niður til toftamenn.

Sætta umfar verður sum sagt 09. januar 2005.

# Fótbóltur á vetrartíð

**Langt um leingi varð seinni dysturin millum MB og SÍF avgreiddur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hetta vóru dystirnir, sum skuldu gera av, hvat av liðunum skuldi halda fram í aðru deild, nú Fótbóltssamtakið Vágar var farið fyribils í søguna.

Og nú er so greitt, at tað verður SÍF, sum heldur fram í hesum. Eftir 3-0 í rokdystinum fyri góðum mánaði síðani, var talan hjá MB hesaferð um eitt sera ungt lið, og hesir fingu ikki gjørt stórt við meira royndu grannarnar úr Sandavági.

13-0 gjørdist endaliga úrslitið, og soleiðis vann SÍF við samanlagt 16-0.

Óneyðuga drúgt

Meira enn fótbólturin, so fer tað tó framyvir helst at vera so, at dystirnir millum MB og SÍF fara at hanga í minninum fyri alt tað, sum fyrifórst uttan fyri vølli.

Her kom av álvara øði í grindina, tá Kappingarnevndin av sínum eintingum tók málið um fyrra dystin upp til viðgerðar. Nakað sum nevndin tó hevur fullan rætt til, um hon metir at annar parturin hevur forbrotið seg inn á fótbóltslógirnar.

Ein partur av úrskurðinum hjá Kappingarnevndini var ta ferðina, at bæði feløgini skuldu lata dómaraseðilin til seinna dystin inn longu eitt samdøgur undan dystinum sjálvum. Hetta tí nevndin við hesum vildi tryggja sær, at talan ikki var um ólógligar leikarar av nøkrum slag.

Teimum kravboðunum noktaði MB at fylgja, og kærdu teir ístaðin avgerðina til Dómsnevndina. Og tað er her, at málið gerst óneyðuga drúgt. Fyrra kæran, sum MB sendi inn í málinum, varð send 5. november, men ikki fyrr enn seinasta vikuskiftið kom so úrskurðurin hjá Dómsnevndini, har tað varð staðfest, at seinni dysturin skuldi spælast.

Tað hevði so við sær, at leikarar, sum millum lítið og einki hava gjørt í ein mánað ella har á leið, aftur noyddust á vøllin, og tað fær ikki verið optimalt fyri nakran partin. Serliga ikki, tá reglurnar hjá Dómsnevndini staðfesta, at ein úrskurður skal fyriliggja í seinasta lagi tvær vikur eftir, at nevndin hevur móttikið eina kæru.





SØKT VERÐUR EFTIR BIÒMUBINDARA

Tú kemur at røkja nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur í gerandisdegnum, og kemur at hava samband við nógv fólk. Tú kemur at loysa arbeiðsuppgávurnar í tøttum samstarvi við leigaran, og kemur at verða sett/ur gjølliga inn í arbeiðið í gerandisdegnum.

**Vit vænta av tær:**
- At tú kanska hevur royndir frá líknandi arbeiði og kennir til starvsgreinina
- At tú ert skilagóð/ur og megnar at hava nógvar bóltar í luftini í senn
- At tú ert nærløgd/lagdur, ert røkin og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert ágrýtin og trívist við at hava nógv jørn í eldinum

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt avbjóðandi og fjøltáttað starv
- Eitt sjálvstøðugt arbeiði har tú fært møguleika at royna teg sjálva/n fult út
- Eitt arbeiðspláss har hýrurin er góður og áhugin fyri arbeiðinum stórur
- Møguleika fyri fakligari menning
- Løn sambært avtalu
- Byrja verður eftir avtalu

Er hetta nakað fyri teg, ella ynskir tú fleiri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum:

Jacob Rummelhoff, deildarleiðari
tel 31 30 11 ella 31 46 66



MIKLAGARÐUR